# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ótíðarhóskandi SEV

Stýrið í SEV hevur gjørt uppskot til viðtøkubroytingar, sum skulu avmarka leiklutin hjá umboðsráðnum hjá SEV. Hesar viðtøkubroytingar tykjast margháttligar.

Vit hava sagt tað á hesum stað fyrr, og siga tað aftur: Tað er ikki rætt, at ein av landins tyngstu fyritøkum reint tekniskt verður stýrd av kommunalpolitikarum, uttan serligan førleika at manna eina virkisnevnd. Hesin bygnaður er í besta føri ótíðarhóskandi.

Tað er púra rætt, at broyting eigur at henda í SEV, men tað, sum SEV stýrið skjýtur upp, er ikki mátin. Tað er ikki gagnligt, um stýrið í SEV fær makt og heimildir sum ein partafelagsnevnd, uttan tó at verða partafelagsnevnd undir partafelagslógini. Man kundi spurt, hví stýrið ikki bara skjýtur upp at umskipa SEV til partafelag við partafelagsnevnd, um tað er tað, man ynskir.

Er tað tí, at sitandi stýri metir, at eingin hevur meiri skil fyri at stýra SEV enn kommunalpolitikarar? Er tað tí, at sitandi stýri ikki vil lata sessirnar í stýrinum frá sær til eina professionella partafelagsnevnd?

Hvat sigur eigarin av SEV til alt hetta? Hvat sigur skattgjaldarin, sum situr kring landið? Vit hava ein av heimsins dýrastu streymprísum, og vit hava kommunalpolitikarar, sum sita tungt á rakstrinum av SEV. Kann tað ikki hugsast, at tey bæði tingini hanga saman?

Stýrið í SEV burdi spurt skattgjaldaran úti í kommununum, hvat hann vil. Einasta man fær burturúr tí, sum nú liggur á borðinum, er eitt stýri, sum at kalla fær sama vald, sum ein partafelagsnevnd, uttan at vera undirløgd somu krøvum frá eigarnum av fyritøkuni, sum er kommunuskattgjaldarin.

Vit kunnu leggja afturat, at hetta er sami kommunuskattgjaldari, sum sambært Kappingarráðnum kann hava goldið ov høgan streymprís í áravís. Sami eigari, sum sær, at leiðslan í SEV, sum man sjálvur hevur sett við at seta krossin við kommunuval, berjist við hond og fót móti, at Kappingarráðið skal hava nakað at siga um SEV. Hvat sigur kommunuskattgjaldarin til, at hansara egnu umboð – kommunalpolitikarnir, sum leiða SEV - royna at skáka SEV uttanum at verða undirlagt Kappingarráðið?

Ein professionell nevnd í SEV er vegurin fram, og eisini eigur SEV at verða undirlagt Kappingarráðnum, eins og alt annað. Hetta er óivað eisini tað, sum besta undirtøkan er fyri millum fólk, men kommunalpolitikarnir, sum stýra SEV, tora eftir øllum at døma ikki at spyrja, hvat eigarin av SEV- komunnuskattgjaldarin - vil.

**Sosialurin**

# Koyra BA-BU við egnum bili?

**JÁKUP SUNI LAURITSEN**
Borgarstjóri í Sørvági



Hans Pauli Strøm landsstýrismaður ger í aftursvari sínum til undirritaða, sær stóran ómak at rósa tilbúgvingini í Vágum.

Rætt skal verða rætt - sjálvbodna tilbúgvingin í Vágum, við Bjargingarfelagnum á odda, hevur roynt at hildið lív í tilbúgvingini. Og tað skulu øll, sum so eldhugað arbeiða fyri hesi søk, hava stóra tøkk fyri. Eingin tilbúgving fær bert bygt á sjálvbodna arbeiðsmegi. Tað eru tveir sera týðandi partar í hesi tilbúgving: Annar er bráfangis læknahjálp og hin er løgreglan.

Almenni myndugleikin hevur ikki styrkt um skipanina, soleiðis sum landsstýrismaðurin vil verða við, vit hava nú eina vánaliga skipan.

**Lokala initiativið væntaði ikki**

Ein sjálvboðin sjúkrabilatænasta virkaði í Vágum frá 1975 til 2005, har einir 15 mans úr øllum bygdunum í Vágum vóru tøkir.(altíð onkur til reiðar)

Í dag eru framvegis tveir sjúkrabilar í Vágum, við nøkrum fáum starvsfólkum, sum eisini hava sítt starvsøki á meginøkinum. Hesi eru møguliga ikki tøk í Vágum, tá ið tørvur eru á teimum.

Landsstýrismaðurin má ansa eftir, at skipanin ikki byggir á ein falskan tryggleika.

**Dapurskygni og bivan**

Ein skal altíð verða varin við at nýta ólukkur og vandastøður sum grundgeving fyri at fáa síni sjónarmið og ynskir framd, og tað vil eg heldur ikki gera, men eg vil bert vísa á, at tá ið skipanir verða broyttar fyri at draga fakligan førleika av oynni, tá byggir skipanin á falskan tryggleika.

**Læknavaktin »anno« 1870?**

Komandi tíð fer at vísa, hvussu læknavaktin fer at virka. Gomul og óhjálpin skulu venja seg við at bíða nógvar tímar til hjálpin kemur fram.

Og um 1870 svarar, so er tað onkur tey ikki kenna, sum tekur telefonina - og ein lækni tey ikki kenna kemur **møguliga** á vitjan.

Tað er ógjørligt hjá einum lækna at røkja eitt øki, sum spennir líka úr Gásadali til Viðareiðis.

Úrslitið av hesum verður at fólk í útjaðaranum fara á náttartíð at koyra BA-BU við egnum bili til Havnar. Í gomlu skipanini kundi læknin verða á staðnum eftir bert 5-10 minuttum.

**Eftirmeting?**

Mín vón er, at vit í Vágum tora at boða frá á røttum stað, um skipanin ikki virkar, og/ella um neyðugt, fara at tora at ringja 1.1.2, sum tá vónandi svarar.

Ein eftirmeting má byggja á veruligar ítøkiligar kanningar, og ikki bert at spyrja áhugabólkar, sum vilja hava alt og øll til Havnar – kosta, hvat tað kosta vil.

# Nýggi skúlin í Hoyvík

**HØGNI MIKKELSEN**
Býráðslimur í Havn



**(Eingin nýggjur skúli í Hoyvík komandi ár, um meirilutin ráddi)**

Tríggjar til fýra mánaðar seinkaður um meirilutin í samgonguni ráddi

Ein meiriluti í samgonguni í Tórshavnar kommunu vildi hava skúlabyggingina við Løgmannabreyt útsetta í nakrar mánaðar.

Á býráðsfundi 23. apríl 2007 var eitt av stóru málunum skúlabyggingin við Løgmannabreyt. Sum øll vita, hevur hendan bygging skund fyri at pláss skal verða fyri øllum skúlabørnunum til skúlaárið 2008.

Tá málið kom fyri í býráðnum, har takast skuldi av einum boði frá sp/f Búsetur, kom eitt mótuppskot frá Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrinu Frýdal – báðar úr Tjóðveldisflokkinum - um at bjóða arbeiðið út av nýggjum.

Fýra býráðslimir tóku undir við uppskotinum – áðurnevndu og Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov úr Javnarflokkinum. Tíbetur fyri skúlan, børnini og foreldur fall teirra uppskot.

Eg kann ikki ímynda mær, hvussu stórur trupulleikin hevði verið, um byggingin bleiv útsett í tríggjar til fýra mánaðar. Eitt er vist, at um byggingin bleiv útsett, so var eingin skúli klárur til at taka ímóti øllum teimum nýggju skúlanæmingunum til skúlaárið 2008. Men tíbetur, borgararnir í kommununi hava ein minniluta, sum tekur øll mál í álvara, og máttu vit í minnilutanum enn einaferð fáa eitt stórt og týdningarmikið mál av bakkastokki.

Tað er ein sannroynd, at í fleiri týdningarmiklum málum gongur samgongan í fleiri bólkum. Hetta ger tað, at sera trupult er at fáa úr hondum gott býráðsarbeiði. Tað er sjón fyri søgn, at stevið er sera vánaligt í samgonguni í Tórshavnar Býráði.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.